# TILTØK

**Gudstænastur**
**6. sunnudag e. Trinitatis**
***Vesturkirkjan:*** kl. 11.00, Bergur D. Joensen
***Havnar kirkja:*** kl. 11.00, Jóannis Fonsdal
***Kaldbak:*** kl. 12.00, Sonja Klein
***Hvítanes:*** kl. 11.00, Bjarni Bæk
***Fríðrikskirkjan:*** kl. 11.00, Martin R. Jacobsen, altargongd
***Fuglafjørður:*** kl. 11.00, Uni Næs
Í *Fuglafjarðar prestagjaldi* gongur talvan fyri Føroysku Sjómansmissiónina
***Skála:*** k. 11.00, Jógvan Fríðriksson
***Gjógv:*** kl. 11.00, messa, Emil Olsen
***Funningur:*** kl. 12.30, messa, Emil Olsen
***Kvívík:*** kl. 12.00, Marjun Bæk, altargongd
***Christianskirkjan:*** kl. 11.00, Hans Eiler Hammer og Norwald Yri, altargongd. Og kl. 18.00 er felags møti í Christianskirkjuni. KFUM & K kórið syngur

**Gudstænasta hóskvøldið 30. juni**
***Sambýlið á Heygnum:*** kl. 19.30: Hans Eiler Hammer

**Hebron, Argir**
Mikukvøldið kl. 20.00 verður bíbliutími og bønarløta.
Sunnudagin kl. 10.30 verður morgunmøti og samstundis barnaansing. Sverri Steintún talar.
Sunnudagsskúlin er farin í summarfrí.
www.hebron.fo

**Frá Ebenezer**
Mikukvøldið kl. 20.00: Bønar- og uppbyggingarmøti. Talari: Rodmundur í Liða.
Leygarkvøldið kl. 20.00: Ungdómsmøti
Sunnudag kl. 10.00: Breyðbróting.
Sunnudagsskúlin í summarfrí.
Sunnudagin kl. 18.00: Evangeliskt møti. Toftafólk luttaka við talu og sangi.
Øll eru vælkomin
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

**Evangeliihúsið**
*Tróndargøta*
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti, kl. 18.00: Evangeliskt møti.
Týskvøldið kl. 20.00: Bønarmøti. www.gospel.fo

**Fríkirkjan Oasan**
*Kirkjustræti 4*
Hóskvøldið kl 20.00 ungdómsmøti v/ útisetum.
Sunnudagin kl. 11.00 guðstænasta v/Jógvan Steintún.
Mánakvøldið kl. 20.00 bønarmøti.
Veri hjartaliga vælkomin.
www.oasan.fo

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti, kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Filadelfia**
*Landavegur 22*
Í dag kl. 06.00: Morgunbøn, kl. 17.00: Bøn, kl. 19.30: Møtirøð í Kelduni v/ Pablo Deiros .
Fríggjadagin kl. 06.00: Morgunbøn, kl. 20.00: Ungdómsmøti.
Leygardagin kl. 17.00: Landsbøn.
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti v/ Tummas Jacobsen, kl. 11.50 ABC. Evni er "Tær 5 tænasturnar" 2. partur við Ólavi Jacobsen, aftaná kaffisteðgin er Summarskúlin fyri børn, kl. 22.00: Útimøti í Vaglinum.
Um tær tørvar persónliga samrøðu og/ella forbøn ring 211067.
www.filadelfia.fo

**Saron, Vestmanna**
Møtini mikukvøldið eru *avlýst* vegna møtirøðina í Kelduni í Skálabotni.

**Filadelfia, Vágar**
Miðvágur: Einki møti mikukvøldið vegna møtirøðina í Kelduni við Pablo Deiros. Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti, Ólavur Jacobsen talar.

**Keldan, Skálafirði**
Mánakvøldið til hóskvøldið eru Karisma-møtir við Pablo Deiros. Møtini eru hvørt kvøld kl. 19.30.
Leygarkvøldið kl. 21.00: Awake við Dánjal Petersen.
Sunnukvøldið kl. 19.00: Møti v/ Helga Abrahamsen, sangur við Oddbjørg og Mary.
*Vælkomin í Kelduna.*
www.keldan.fo

**Lívsins Orð**
*Saltangará*
Mikukvøldið einki møti venga møtini við Pablo Deiros í Kelduni).
Sunnudagin: Møti kl.18.00.

**Siloa, Fuglafirði**
Bøn, bíbliulæra og hugnalig samvera við drekkamunni verður í Siloa í kvøld kl. 19.30. Klæmint Eliasen talar. Evni: 1. Korintbræv kap. 3. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Skopun**
Mikukvøldið kl. 20.00: Bíbliutími, 1. Kor. 2. kap.

**KFUM & K Klaksvík**
Mikukvøldið kl. 20.00: Bíbliutími við Ólavur í Mittúni evnið: Malakia.
Fríggjakvøldið kl.22.00: Opið hús.
Sunnudagin kl.14.00: Bønarløta.
Sunnudagin kl.18.00 einki møti í KFUM & K, men felagsmøti í Christianskirkjuni saman við Emmaus.
Sunnukvøldið kl. 21.00: Ungdómsmøti.
www.kuff.fo

**Getsemane, Klaksvík**
Mikukvøldið kl.20.00 er bønarmøti.
Fríggjakvøldið kl.20.30 er ungdómsmøti við Eyðun Jacobsen.
Sunnudagin kl.13.30 sunnudagsskúli og kl.18.00 er møti.
Tú ert hjartaliga vælkomin!

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
*Týsdagin 28. juni:*
kl. 10-11.30: Vit syngja saman við gestum úr Mosfellsbær í Íslandi.
Óli Vang.
Hugnaløta verður í kjallaranum aftaná.
Øll eru hjartaliga vælkomin.
kl. 10-17: Opið hús.
*Mikudagin 29. juni:*
Tilhaldið STONGT.
Túrur til Runavíkar. Úr Steinatúni kl. 10.00. Vitja fornminnissavnið á Glyvrum. Døgurði á Sjócaféini. Vitja Runavíkar kommunu kl. 14.00. Aftur í Havn umleið. kl. 17.00.
Kostnaður 250 kr. gjaldast áðrenn farið verður.
*Hósdagin 30. juni:*
kl. 10-17: Opið hús.
*Fríggjadagin 1. juli:*
kl. 10-17: Opið hús.
*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Tilhaldið Hugnin í Sandoy**
er opið mánadag og mikudag frá kl.- 14 til 17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Bløðini eru eisini til taks. Øll eru hjartaliga vælkomin.
***Mikudagin 29. juni:*** Vit arbeiða víðari við blómunum. Hetta er eisini seinasti dagur áðrenn summarsteðgin. Lýst verður í bløðunum nær vit byrja aftur.

**Dagtilhaldið Fløvi**
Í Kvinnufelagshúsinum á Glyvrum. Tlf. 448279. Allir pensionistar eru hjartaliga vælkomnir. Opið er mánadag til fríggjadag kl. 15 – 18. *Hvønn dag er ein góður drekkamuður at fáa. Bløðini eru altíð til taks. Somuleiðis kort og spøl. Tú ert vælkomin at hava títt egna hondarbeiði við. Andakt verður lisin hvønn dag.*

**Vága Pensionistafelag**
Vit skipa fyri tiltøkum nakrar ferðir um árið. Kundi tú hugsað tær at vita meira um felagið ella at gerast limur, kanst tú venda tær til, formannin: Frits Jacobsen, tlf. 332053 ella ein av nevndarlimunum.

**Eldrahugni á Tvøroyri**
Er á kafeteria í høllini í Trongisvági hvønn onsdag í *líkaviku* frá kl 15.00 til 18.00. Bilur fæst til staðið við at ringja 371069 eftir kl. 13.

**Dagtilhaldið í Vági**
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh.
tlf. 319630/61 655400.

**Spælistovan í meinigheitshúsinum**
**er í summarfrí frá 1. juli til 5. september 2005.** Tá verður spælistovan í Margarinfabrikkini.

**AA-fundir í Havn**
Tinghúsvegur 37
Mánadag: kl. 20.00–21.00
Týsdag: kl. 20.00–21.00 Stóri bókafundur
Mikudag: kl. 20.00–21.00
Stiga- og siðafundur
Hósdag: kl. 20.00–21.00
Fríggjadag: kl. 20.00–21.00 og kl. 22.30–23.30
Leygardag: Opin fundur kl. 09-10, kl. 17.00–18.00 og kl. 22.30-23.30
Kvinnufundur kl. 20–21.00.
Sunnudag: kl. 11.00–12.00.
Heimasíða: http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**NA (Anomymir narkomanar)**
Tinghúsvegur 37
NA-Fundur hvørt sunnukvøld kl. 20.00 til 21.00 á Tinghúsvegnum 37.

**Al-Anon**
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt hóskvøld kl. 20 og sunnudag kl. 17. Síðsta sunnudag í mánaðinum er opin speakarafundur í Al-Anon, Tinghúsvegur 37.

**AA-fundir í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**Al-Anon**
Fundir fyri avvarðandi at alkoholikarum er mánakvøld kl. 21.00 á Glyvrum. Í gomlu lærara íbúðini í Glyvra skúla.

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld kl. 19.00 og sunnudag kl. 16.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**Al-Anon í Vágum**
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15.
Hvønn sunnudag síðst í mánaðinum – opin fundur kl. 15.

**AA í Vági**
AA fundir verða í Undirhúsinum onsdag og leygardag kl. 19.00.

**Blái Krossur – Glyvrar**
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

**Blái Krossur – Eiði**
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

**Fyribyrgingarráðið**
*Argjaboðagøta 7 · 160 Argir*
*postrúm 135 · 110 Tórshavn*
tlf. 315155 · fax 320272
Teldupostadr.: fyribyrg@fyribyrg.fo
heimasíða: fyribyrg.fo

**Hjartafelagið**
Postboks 3120, 110 Tórshavn
e-mail: hjartafelag@hotmail.com

**Náttarravnarnir í Tórshavn**
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr. Ringið: Ella 316261, Tone 261165, Hans Jákup 778170, Guðrið 314607. Arni 222552

**Ørkin, Reykjavík**
Møti hvørt sunnukvøld kl. 20.30.

**Føroyskir fiskimenn uttanlands**
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi. Limagjald 200 kr. um árið. Postgiro 57894.
Fø. Sparikassi 442027-8.

**Føroyskir Mærsk Siglarar**
*Postboks 11, 490 Strendur*
Frítíðarfelag, hvørs endamál er at røkja áhugamál hjá teimum føroyingum, ið starvast hjá A. P. Møller – Mærsk A/S. Meira fæst at vita, við at venda sær til felagið á tlf. 590100 ella um teldupost: aldebaran@kallnet.fo

**Føroya Felag Móti Krabbameini**
*Grønlandsvegur 58, Tórshavn*
Telefontíð mánadag til fríggjadag frá kl. 13-15.
Tlf. 317959.
Teldupost: ffk@post.olivant.fo
www.ffk.fo

**Kvinnuhúsið**
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

**Felagið fyri lesi- og skriviveik**
*Postadr.: MBF-Húsið Íslandsvegur 10c*
Endamál felagsins er at hjálpa teimum ið hava lesi- og skrivitrupulleikar. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð men samband fæst við felagið á tlf. 441541, Anne Karin Kjeld og 318867, Laila Egholm.

**Amnesty International Føroya Deild**
Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Tlf. 315816
Skrivstovan er opin mánadag frá kl. 9.00 til 17.00 og mikudag frá kl. 9.00 til 16.00
Heimasíða: www.amnesty.fo
Teldupostur: amnesty@amnesty.fo

**LFÚ-skrivstovan**
hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 15 til 18. LFÚ ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl 16 til 18.
Tinghúsvegur 18, 3. hædd, Tórshavn.
Tel. 310220 (skrivstovan)
tel. 315015 (ráðgevingin).
Teldupostur: lfu@post.olivant.fo
Heimasíða: www.lfu.fo

## Gullbrúdleyp

Leygardagin 2. juli hava hjúnini Betty og Páll Mikkelsen, Tórshavn, gullbrúdleyp. Tey, ið ynskja at gleða gullbrúðarparið, eru vælkomin í heimið í Dr. Dahlsgøta 8 frá kl. 10.00 til kl. 15.00.

## Silvurbrúdleyp

5. juli kunnu hjúnini Joan og Tage Jørgensen, Sørvágur, halda silvurbrúdleyp. Veitslan verður í Sørvágs Bio 9. juli kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða silvurbrúðarparið, verða biðin um at ringja tlf. 266018/332326 ella 333663 áðrenn 1. juli.

## Brúdleyp

Leygardagin 2. juli kl. 17.00 giftast í Vesturkirkjuni, Margaret Ludvig og Heri Kjelnæs, Tórshavn. Veitslan verður fyri innbodnum í HB-húsinum kl. 19.00.

## 90 ár

Fríggjadagin 1. juli verður Martina T. Kruse á Eiði 90 ár. Tey, ið hava hug at heilsa upp á hana, eru vælkomin hjá dóttrini Tiu millum kl. 16.00 og 19.00.

## 80 ár

Mikudagin 29. juni fyllir Harry Joensen í Klaksvík (vanliga nevndur Harry í Vági) 80 ár. Føðingardagurin verður hildin í Skálanum kl. 18.00.

## 75 ár

Hósdagin 30. juni fyllir Torleif Simonsen í Sandavági 75 ár. Føðingardagurin verður hildin heima.

Fríggjadagin 1. juli verður Torleif Bech, Porkeri, 75 ár. Dagurin verður hildin heima við morgunmati millum kl. 10.00 og 14.00.

Fanny Reinert Djurhuus, Innan Glyvur, fyllir 75 ár 4. juli. Vælkomst verður í bygdasalinum í ítróttarhøllini á Skála frá kl 19.00

## 70 ár

Fríggjadagin 1. juli fyllir Hannis Jacobsen, Tórshavn, 70 ár. Dagurin verður hildin heima, Hamarsgøta 1, leygardagin 2. juli frá kl. 10.00-15.00.